# Hotel Vágar missir milliónir

**Tað fer at kosta Hotel Vágum einar tvær milliónir krónur í mistum umsetningi, at Maersk Air hevur gjørt av at flyta alla matgerð til Kastrup**



*Hotel Vágar fer at missa einar tvær milliónir í umsetningi, nú catering avtalan við Maersk Air fer úr gildi 1. juli*

*Mynd: Edvard Joensen*

FLOGFERÐSLA

*Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað fer at kosta Hotel Vágum einar tvær milliónir krónur í umsetningsmissi, at Maersk Air hevur sagt upp avtaluna við hotellið um matgerð til flogførini, sigur leiðarin á Hotel Vágum, Kári Hentze.

Maersk Air hevur gjørt av, at øll matgerð til flogførini hjá felagnum skal gerast í Kastrup og tískil eisini latast umborð har. Felagið hevur eisini innført eina nýggja skipan, sum ger, at ferðafólk um internetið kunnu bíleggja tað, tey vilja hava at eta umborð.

Men tað ger so, at tey, sum fyrr hava latið flogførunum hjá Maersk Air proviant, ikki sleppa at gera tað í framtíðini. Og ein av hesum veitarum hevur verið Hotel Vágar. Men frá 1. juli er tað samstarvið hildið uppat, sigur Kári Hentze, leiðari á Hotel Vágum.

At eingin matgerð verður til Maersk Air flogførini í framtíðini, fer at merkja, at Hotel Vágar missir ein umsetning upp á einar tvær milliónir krónur, sigur Kári Hentze. Og eisini eini fýra - fimm ársverk hvørva av hotellinum, sigur leiðarin. Umframt koma so tær 200.000,- til 300.000,- krónurnar, sum føroyskar heilsølur missa, tí eingin vøra til tilgerð av provianti verður keypt haðani frá, vísir hann á.

Kári Hentze sigur, at Hotel Vágar í síni tíð í grundini varð bygt sum eitt samstarv millum Flogfelag Føroya og Maersk Air. Soleiðis at skilja, at tað var Flogfelagið, sum bygdi hotellið, men við eini munnligari avtalu við Maersk Air sum grundarlag. Nú verður samstarvið sagt upp við 14 daga ávaråing, sigur Kári Hentze.

Provianterin, ella catering, sum tað á fakmáli verður nevnt, var einaferð høvuðsvirkið hjá Hotel Vágum. Men tað er ikki soleiðis meira, og tí fer hotellið heldur ikki á húsagang av hesum, sigur leiðarin.

– Men tað er greitt, at vit fara at merkja hetta væl, sigur hann. Hesi fýra - fimm fólkini skulu nú fáast í annað starv hjá hotellinum, og tað man nokk fara at ganga. Vit mugu so satsa meira upp á matstovuna, sigur leiðarin á Hotel Vágum.

Hotellið hevur seinnu árini skipað fyri nógvum ymsum tiltøkum, sum hevur drigið væl av fólki. Og serliga síðan Vágatunnilin lat upp, hevur hotellið verið væl vitjað.

Tiltøkini halda fram, sigur Kári Hentze. Millum annað fer Hotel Vágar í summar at skipa fyri Føroyakvøldum, eins og gjørt hevur verið undanfarin ár. Men í ár hava tey vónir um enn betri undirtøku enn fyrr, tí nú er fasta sambandið undir Vestmannasundi veruleiki.

# Nú hava vit hann her

**Forsætisráðharrin er nú komin til Føroya. Flogfarið við Anders Fogh Raasmussen og fylgi lendi í Vágum stutt eftir klokkan hálvgum tíggju mikukvøldið. Beint eftir at flogfarið við formansskapinum í Fókatinginum var lent**



ALMENN VITJAN

*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Forsætisráðharrin var væl upplagdur og hevði hug at skemtast, tá hann kom úr flogfarinum há Atlantsflogi mikukvøldið.

– Eg havi hug at halda, at løgmaður hevði biðið um hetta veðrið, sum gjørdi, at vit máttu royna tíggjar ferðir, fyri at fáa kroyst pening til flogvøllin burtur úr okkum, segði hann við Sosialin, eftir at hann hevði heilsað upp á løgmann.

Forsætisráðharrin segði, at hann sjálvandi ikki hevði nakran pengaposa við hesaferð, men flogvøllurin fór at vera millum tey mál, hann fer at tosa við løgmann um, segði hann.

Annars væntaði hann, at skráin, sum eftir er av vitjanini, fór at verða fylgd.

# Formansskapurin vitjar

**Teirra millum sum gjørdu fleiri royndir at lenda í Vágum mikudagin, var eisini formansskapurin í Fólkatinginum. Tey komu í Vágar beint áðrenn hálvgum tíggju mikukvøldið**



*Christian Mejdahl, fólkatingsformaður, og frú Eva Mejdahl á veg at heilsa upp á løgtingsformannin, Edmund Joensen*

VITJAN

*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Edmund Joensen, løgtingsformaður, var saman við frúu, formansskapinum í Løgtinginum og embætisfólki á flogvøllinum og tók í móti, tá flogfarið við formansskapinum í Fólkatinginum lendi í Vágum mikukvøldið.

Eftir at vertir og gestir høvdu heilsast, var farið við bussi til Havnar, har gestirnir skulu gista. Almenna skráin bygjar so hósdagin.

Meðan móttøkan fyri formansskapinum í Fólkatinginum var á flogvøllinum, rullaði flogfarið við forsætisráðharranum inn eftir vøllinum, men tey bæði fylgini møttust tó ikki á flogvøllinum.

# Kórvitjan úr Danmark

**Sorø Underholdningskor kemur í komandi viku á vitjan í Føroyum. Konsertir verða hildnar í Sandavági, Fuglafirði og í Havn**



*Einir hálvthundrað sangarar eru í Sorø Underholdningskor*

KONSERTFERÐ

*Edvard Joensen*

Sorø Underholdningskor, sum er rættiliga nýtt kór, fer í komandi viku at halda konsertir ymsastaðni í Føroyum.

Sorø Underholdningskor er, sum navnið sigur, mannað við fólki úr Sorø og har á leið.

Tað var núverandi kórleiðarin, Jørgen Bjørno, sum í 1994 tók stig til at stovna kórið, verður sagt í tíðindaskrivi frá kórinum. Einir hálvthundrað sangarar eru í kórinum, sum hevur gjørt nógv av at ferðast, hesi árini, tey hava sungið saman. Millum annað hava tey vitjað øll Norðurlondini og Týskland, verður sagt í tíðindskrivinum.

Kórið hevur eisini luttikið í ymsum kappingum og hevur vunnið onkra teirra, siga tey. Tað hevur so aftur gjørt, at tey hava verið at sæð og hoyrt bæði í sjónarpi og útvarpi.

Skráin hjá kórinum fevnir víða. Alt frá klassiskum kirkjutónleiki, til nýggjan meira fólkaligan tónleik, sum tey siga. Kórleiðarin ger sjálvur útsetingarnar, sum eisini geva kórinum ein egnan samleika.

Føroyaferðin hjá Sorø Underholdningskor varir eina viku, og konsertir fara at verða hildnar millum annað í Sandavági, í Fuglafirði og í Havn.

# Kappríðing í Vágum

**Leygardagin skipar Vága Ríðingafelag fyri árligu kappríðingini og hugnaløtuni Niðri við Vatn**

SUMMARHUGNI

*Edvard Joensen*

**Vágar:** Árliga sumartiltakið, sum nevnt verður várkappríðingin, hjá Vága Ríðingafelag, verður hildið Niðri við Vatn leygardagin.

Tiltakið varir at kalla allan dagin. Byrjað verður longu klokkan 11 fyrrapartin, og so verður hildið á til út á náttina.

Vága Ríðingafelg hevur fingið nýggja ringbreyt, sum brúkt verður til íslandsross, ið sýna fram gonguløg. Og tað verður við innleiðandi kapping í gongulagnum Tólt, at byrjað verður klokkan ellivu á nýggju breytini.

Klokkan 15 seinnapartin verður so vanliga kappríðingin á gomlu breytini.

Tá klokkan er 17 ella har á leið, verður farið oman aftur á nýggju breytina, har finalan í gongulagskappingini fer at verða hildin.

Hugnaløtan byrjar klokkan 21 við felagssangi. Tá verður nýggja ringbreytin alment tikin í nýtslu. Formaðurin í Ríðisambandinum, Hjalmar Petersen, fer at halda røðu. Sørvágs Tónleikarafelag og Vestmanna Hornorkestur fara at spæla.

Seinni verður so midnáttarrøða, sum Tummas Hans Gaardlykke fer at halda. Og so verður dansað.



# Tørvurin til sinnisveik er ovurstórur

**– Tað eru 40 sjúklingar á psykiatrisku deild, sum ongastaðni hav at fara, og sum kundu verið útskrivað. Men tey hava brúk fyri góðum umstøðum, sigur Svenning á Lofti, formaður í Sinnisbata. Hann metir, at húsini, sum vórðu keypt í Sandavági til at brúkast til sinnisveik, eiga at vera brúkt til hetta málið ella noyðist landsstýrismaðurin at keypa tey av eini aðrari játtan**



*Svenning á Lofti, formaður í Sinnisbata, heldur, at húsini, sum vóru keypt í Sandavági til sinnisveik eiga at verða brúkt til hetta endamálið og onki annað. Ella noyðist landsstýrismaðurin at keypa tey av eini aðrari játtan*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

PSYKIATRI

*Ingrid Bjarnastein*

– Vit hava bíðað eftir eini avgerð í hesum málinum leingi nú. Vit hava spurt eftir málinum, tí onki er hent, og vit hava biðið um fund bæði við Bill Justinussen og løgmann, fyri at fáa greiði á, hvat skal henda, sigur Svenning á Lofti, formaður í Sinnisbata.

Málið, Svenning á Lofti, sipar til er málið um húsini í Sandavági, sum skuldu brúkast til sambýli til sinnisveik.

– Vit gleðast yvir, at hetta tykist at vera komið uppá pláss, men vit halda, at tá húsini eru keypt til hatta endamálið, so eiga tey at brúkast til tað, heldur formaður í Sinnisbata.

Nógv rumbul hevur verið á hesum økinum. Fyri tað fyrsta var tað, at toga var um málsøkið millum Tjóðveldisflokkin og Miðflokkin, og fyri tað næsta, so eru tey fleiri fólk, sum hava sagt upp júst á hesum økinum.

– Tað vóru nógv, sum søgdu seg úr starvi. Bara ein er sett, og tað er fyri Jákup Foldbo. Ongin er settur fyri Hildu Viderø, sum var samskipari av sosialpsykiatriini, og hon fór úr starvi 1. mars í ár.

Svenning á Lofti vísir á, at nú er ongin at samskipa hetta økið, og tað eru tey í Sinnisbata ógvuliga hørm um.

## Til sinnisveik

Svenning á Lofti sigur, at tað má vera ein misskiljing, tá Páll á Reynatúgvu sigur, at hann ætlar at brúka húsini til okkurt annað - møguliga til sambýli fyri menningartarnað ella heilaskadd.

– Páll á Reynatúgvu kann ikki brúka pengar, sum eru settir av til sálarsjúk til endamál. Tað haldi eg ikki kann lata seg gera. Eru húsini keypt til sálarsjúk, so skulu tey brúkas til tað. Um ikki, so skal landsstýrismaðurin keypa tey við pengum, sum eru játtaðir til menningartarnað ella heilaskadd, heldur Svenning á Lofti.

Formaður í Sinnisbata vil gera vart við, at tørvurin á einum slíkum heimi er ovurstórur. Og er hesin tørvurin uttan iva nógv størstur í miðstaðarøkinum.

– Sjálvt um tørvurin ikki er so stórur beint í Vágunum, so haldi eg ikki, at húsini skulu brúkast til nakað annað fyri tað. Men tørvurin er so stórur, at tað eru 40 fólk á psykiatrisku deild, sum væl kundu verið skrivað út, um tey fingu okkurt at búgva í, greiðir Svenning á Lofti frá. Hann leggur afturat, at sálarsjúk kunnu ikki bara proppast, hvar sum helst. Tey mugu hava góðar umstøður, sum eru bygdar til endamálið.

## Ov dýrt

Í juni í fjør var ein nevnd sett, sum gjørdi eina ætlan um bygging av einum sambýli til sinnisveik í Havn. Henda ætlan varð løgd fram fyri landsstýrismannin í Almannamálum, Páll á Reynatúgvu.

– Tað einasta Páll á Reynatúgvu segði var, at tað var ov dýrt, og málið var lagt á hillina, og onki varð gjørt. Men sjálvur haldi eg ikki, at húsini vóru ovmikið dýr.

Sum er nú, er onki pláss til sinnisveik.

– Sinnisbati harmast stórliga um, at ongin samskipari er settur á sosialpsykiatriina Og vit vilja inniliga heita á avvaraðndi myndugleikar um at fáa hetta loyst, sum skjótast, sigur Svenning á Lofti, formaður í Sinnisbata.

# Blómur til øll

TÍÐINDASKRIV

*All That Rain*

Ein tann mest og best umtókti føroyski sangurin »Fagra blóma« hjá Poul F. Joensen, er nú endur innspældur. Hesuferð er tað bólkurin All That Rain, sum hevur spælt sangin inn á nýggjum.

Hesar fyrstu dagarnar verður upptøkan latin útvarpsrásunum. Seinni, er so ætlanin at tað skal gerast møguligt hjá øllum teimum, ið hava internetsamband, at ogna sær hetta nýggja lagið. Tað verður nevniliga lagt út á heimasíðuna hjá All That Rain, www.allthatrain.com og tað verður frítt hjá øllum teimum, ið hava hug, at taka sær lagið niður á telduna.

Tað hóskar seg væl at fáa lagið út til fólkið um jóansøkuna. Pól Arni Holm, sum jú er suðuroyingur, og sjálvur yrkjarin er eisini ættaður úr Suðuroynni.

Vit tóku lagið til okkum sum eitt av teimum fyrstu eftir, at Pól Arni Holm kom við í bólkin, og hava fólk tikið væl ímóti tí higartil.

Fleiri góð fólk hava eggjað okkum og lagt okkum lag á at flyta okkum og ljóðførini inn í upptøkuhølini fyri at fáa innspælt hetta lagið á okkara hátt.

Fagra blóma er endurinnspæld fleiri ferðir áður, og hesuferð er yrkingin spæld inn við nýggja lagnum, sum Hanus G. Johansen hevur gjørt.

Tað er serliga hetta lagið, sum vit halda er vakurt, tí hetta er tað besta, ið er hent við framúrskarandi yrkingina hjá Poul F. Og vit vilja á henda hátt heiðra ein av Føroya bestu yrkjarum og ein av okkara bestu lagsmiðjum.

Ætlanin er ikki at selja nýggu innspælingina til fólk, tí vit meta, at lagið longu er ein fólkaogn føroyinganna. Tískil verður tað ókeypis at taka lagið niður av netinum.

Upptøkan er gjørd í Útvarpshøllini, og tað er Albin Wang Ísaksson, ið hevur staðið fyri upptøku og ljóðbandi. Hann hevur somuleiðis eisini spælt tangentar á upptøkuni.

